# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað er umráðandi, at vit halda somu kós sum higartil, tí hon hevur víst seg at vera tann rætta*
*(Vladimir Putin)*

# Nargis kravdi 100.000 mannalív



*Meiri enn ein millión fólk í Burma mistu hús og heim í melduródnini*

*(Mynd: Polfoto)*

**Amerikanskir myndugleikar vilja vera við, at melduródnin Nargis hevur kravt umleið 100.000 mannalív í Burma**

- Upplýsingarnar, sum vit hava fingið, benda á, at talið á deyðum kann vera umleið 100.000 og kanska oman fyri tað, sigur Shari Villarosa, sum er ovasti amerikanski diplomaturin á amerikonsku sendistovuni í Burma.

Melduródnin gjørdi serliga stóran skaða í Irrawaddy-ósanum, og tað er eisini har, at nógv flest mannalív eru farin. Shari Villarosa sigur við amerikanskar fjølmiðlar, at umleið 95 prosent av øllum húsum og bygningum í økinum í og kring ósan eru oyðiløgd, og at støðan hjá teimum, sum framvegis eru á lívi har, er syndarlig.

Útlendskir hjálparfelagsskapir bera ótta fyri, at umfarssjúkur kunnu fara at gera um seg, tí tørvurin á reinum vatni er ovurstórur. CNN sigur, at fólk í tíggjutúsundatali hava einki reint vatn, og tey hava lítið og einki at eta.

### Stýrið undir trýsti

ST, ES og USA hava lovað at hjálpa Burma við pengum, men tey hava ikki álit á, at hernaðarstýrið fer at brúka pengarnar til at hjálpa teimum raktu.

Samstundis sýta myndugleikarnir fyri at lata fremmand hjálparfólk sleppa inn í landið. Felagsskapinum av asiatiskum londum, Asean, heitti í morgun á hernaðarstýrið um at taka av tilboðnum um hálp.

- Ein millión fólk mugu fáa hjálp beinanvegin, segði talsmaðurin hjá Asean, Surin Pitsuwan, við Reuters. Hann legði afturat, at fleiri Asean-lond leggja stórt trýst á stýrið í Burma fyri at fáa tað at lata dyrnar upp fyri altjóða hjálp og hjálparfólki.

# Politiska kósin verður ikki broytt



**Dmitrij Medvedev lovar at tryggja mannarættindini og at bøta um gerandisdagin hjá russiska fólkinum**

Tað kom ikki óvart á nakran, tá nývaldi russiski forsetin, Dmitrij Medvedev, nýtti sína fyrstu røðu sum forseti til at vissa áhoyrararnar um, at hann fer at halda fram á somu politisku kós sum undanmaðurin Vladimir Putin. Hann vissaði eisini áhoyrararnar um, at hann fer at tryggja russiska fólkinum mannarættindi, og at hann fer at leggja seg eftir at gera gerandisdagin hjá russum lættari.

Dmitrij Medvedev er tann triði russiski forsetin, síðani Sovjetsamveldið datt sundur, men hóast tað er hann, sum situr í landsins ovasta embæti, sleppur hann ikki undan at lurta eftir undanmanninum, sum í dag hevur tikið við sum forsætisráðharri.

- Tað er sera umráðandi, at vit halda somu kós sum higartil, tí hon hevur víst seg at vera tann rætta, segði Vladimir Putin í sínari fráfaringarrøðu. Mong halda, at í veruleikanum eru tað framvegis Putin og hansara sameindu, sum sita við róðrið í Kreml. Men eygleiðarar vísa samstundis á, at Putin er sera væl umtóktur í Russlandi, og at tað kann koma eftirmanninum til góðar.

*Nýggi russiski forsetin, Dmitrij Medvedev*

*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Harðari revsingar

Ræðuleikarnir í kjallaranum hjá Josef Fritzl hava nú havt við sær, at eysturríksku myndugleikarnir ætla sær at herða revsingina fyri kynsligan ágang og lógarbrot av slíkum slagi. Alfred Gusenbauer, kanslari, segði í gjár, at umframt harðari revsing skulu allar upplýsingar um tey, ið fremja kynsligan ágang, goymast nógv longri enn higartil, og tey sleppa ikki at røkja ávís størv ella at ættleiða børn. Kanslarin duldi ikki fyri, at tað vóru ræðuleikarnir í kjallaranum hjá Josef Fritzl, sum høvdu fingið stjórnina at taka nýggju stigini. Hann segði seg vóna, at broytingarnar kunnu fáa gildi í seinasta lagi á nýggjárinum.

### Vil ikki sendast heim

Polska ákæruvaldið vil fegið hava fatur á Premyslaw Plank, sum er í Íslandi, tí hann er undir illgruna fyri morð í heimlandinum. Póllendingar hava tí spurt um at fáa mannin útflýggjaðan úr Íslandi, og býarrætturin í Reykjavík skal nú taka støðu til, um grundarlag fyri fyri at ganga áheitanini á møti. Premyslaw Plank hevur sjálvur boðað frá, at hann vil ikki heimaftur, og tí er lítið at ivast í, at hann fer at leggja málið fyri íslendska hægstarætt, um býarrætturin í Reykjavík ger av at senda hann av landinum. Løgmálaráðið í Reykjavík hevur gjørt av at ganga polsku áheitanini á møti, og ger dómsvaldið tað sama, koma polskir løgreglumenn til Íslands eftir Premoslaw Plank, skrivar Morgunblaðið.